

# Hanus hoyrir til

**Hanus G. Johansen hoyrir við til ein góðan Summar Festival. Ja, frásøgumaðurin Sjúrður Skaale fór i fjør so langt og segði, at orsøkin til, at Summar Festivalurin verður hildin, var tí Hanus G. Johansen var føddur**

Á øllum fýra undanfarnu Summar Festivalunum hevur Hanus G. Johansen spælt, og hansara framførslur hava verið framúr góðar – og aftur í ár fáa festivalgestir møguleikan at uppliva meistaran á palli.

Hanus Gærdum Johansen vaks upp í Klaksvík, og hann var virkin í tónleikalívinum í Klaksvík í nógv ár. Hann fór at spæla gittar og syngja sum blaðungur, og hann var við í onkrum tónleikabólkum. Millum annað var hann við til fyrstu innspælingarnar hjá Frændum.

Hanus er tó fyrst og fremst kendur sum tann fólkakæri vísusangarin, sum dugir at fanga einhvørja mannfjøld – um hon er stór ella lítil. Útgávan Gaman og álvara staðfesti støðuna hjá Hanus sum ein framúr lagasmið og sangara – ikki minst tá ið hann tulkaði Pól F. Joensen – og hendan útgávan er júst endurútgivin sum fløga. Hanus hevur eisini spælt saman við klassiska orkestrinum Aldubáruni, og hann hevur givið fløgu út við tónleiki, sum hann hevði gjørt til yrkingar hjá norðmanninum Jakob Sande.

Í farnu viku var Hanus G. Johansen heiðraður við Listavirðisløn Miðlahúsins, og síðani seinasta Summar Festivalin hevur Hanus endurútgevið Gaman og Álvara á fløgu.

Og Hanus er til reiðar til enn ein Summar Festival, og tað kunnu øll gleða seg til!

**Hanus G. Johansen spælir fimta árið á rað á Summar Festivalinum – og hann er betri umtókur enn nakrantíð áður**

# Anna ætlar sær langt

## 16 ára gamla songkvinnan av Glyvrum hugtekur við sini frálíku rødd

Anna Nygaard av Glyvrum var í ár ein sannførandi vinnari av Ársins songrødd. 16 ára gamla songkvinnan sang ein sang hjá Aretha Franklin, og hon streyk avstað við sigrinum í kappingini. Nógvar stórar songkvinnur hava fingið sín elddóp í Ársins songrødd, og líkt er til, at ein nýggj kvinnulig songstjørna er á veg.

Ein av vinningunum í Ársins songrødd var møguleikin at spæla á Summar Festivalinum, og hesum møguleika tekur Anna Nygaard av. Hon fer at spæla saman við bólki sínum.

- Eg ætli mær at vita, hvussu langt eg kann koma við tónleikinum. Beint nú fokuseri eg bara uppá konsertina á Summar Festvialinum, og so fái eg at síggja aftaná tað, hvat víðari fer at henda, sigur Anna Nygaard.



**Anna Nygaard er Árins songrødd, og hann sleppur rættiliga at royna seg á Summar Festivalinum**